

## Vænta rentuhækking í Noregi

Búskapartíðindastovan Bloomberg væntar, at Noreg verður tað fyrsta av ídnaðarlondunum, sum fer at hækka ta leiðandi rentuna. Noreg er millum heimsins størstu oljulond og er sambært Bloomberg ikki so meint rakt av fíggjarkreppuni sum flestu onnur ídnaðarlond. Norski tjóðbankin hevur lækkað rentuna støðugt tað seinasta árið. Í september í fjør var rentan 5,75 prosent, og nú er hon 1,25 prosent, sum er tað lægsta nakrantíð. Bloomberg skrivar, at tiltøk hjá stjórnini hava økt eftirspurningin á norska heimamarknaðinum nóg. Harafturat eru húsaprísirnir hækkaðir meiri enn fimm prosent teir seinastu tríggjar mánaðirnar.

## Óttast ikki krímsjúkuna

Sambært einari spurnarkanning hjá tí íslendska Fréttablaðnum leggja íslendingar ikki stórvegis í Influensa A ella svínakrím, sum sjúkan eisini verður rópt. Næstan 75 prosent av teimum spurdu svaraðu, at tey óttast ikki sjúkuna, og tað sæst, at fólk á bygd stúra eitt lítið sindur meiri fyri sjúkuni enn fólk í Reykjavík og har um vegir. Annars vísir kanningin eisini, at kvinnur hugsa meiri um krímið enn menn. Í hvussu er óttast 21 prosent av kvinnunum sjúkuna, meðan 13 prosent av monnunum søgdu seg óttast hana. Fréttablaðið spurdi eisini fólk, hvønn politiskan flokk tey velja, og her vísir kanningin, at veljarar hjá Framsóknarflokkinum óttast krímið meiri enn veljarar hjá øðrum flokkum.



# FUTT funnið sína hill

**Mánakvøldið 27. Juli var startskotið á ólavsøkuna hildið í Tórsgøtu í Havn. Við feitum og fjølbroyttum tónum bjóðaði FUTT í býin til eina heldur øðrvísi ólavsøkukonsert, ið eftir øllum at døma langt um leingi nú hevur funnið sítt rætta stað – nevniliga í Tórsgøtu**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Mánakvøldið byrjaði ólavsøkan av álvara. Við einari skrá, ið avgjørt umboðaði bestu tónleikarar í Føroyum, var Tórsgøta á gosið – hóast veðrið ikki var av tí besta.

Hetta er annð árið á rað, at Tórsgøta hevur verið karmur um ólavsøkukonsertina. Áðrenn hetta var konsertina vanliga hildin í Kommunuskúlagarðinum í Havn, men sigast má, at hetta var ein tradition, ið hevði tørv á broytingum. Kommunuskúlagarðurin var kendur fyri at verða fyri tey heilt ungu, og neyvan nakar tónleikari ella tónleikabólkur kundi økja um miðalaldurin til konsertirnar. Men nú er hetta øðrvísi.

Við sama konsepti bjóðaði FUTT í Býin til ólavsøkukonsert í Tórsgøtu, og frá ári til ár bleiv hendan fleiri ára gamla traditión brotin. Ung sum gomul leitaðu sær í Tórsgøtu hetta fyrsta ólavsøkukvøldið, og við nøvnum sum Frændur, Terji Rasmussen, Jens Marni Hansen, Páll Finnur Páll og Faroe5 var als einki at ivast í – ólavsøkukonsertin er aftur á lívi.

### Vælnøgdur varaborgarstjóri

Tað var við fyrivarni, at fyrireikararnir av FUTT í Býin fingu játtað at flyta konsertina oman í Tórsgøtu, men nú er varaborgarstjórin ikki í iva longur.

Vit vóru skeptisk, tá ið fyrireikararnir í fjør spurdi okkum, um tey kundu flyta konsertina oman í Tórsgøtu. Men tað riggaði so mikið væl í fjør, at í ár vóru vit als ikki í iva, sigur Bogi Andreassen við Rás2.

Eisini fyriskipararnir av konsertini vóru væl nøgd við úrslitið.

Vit settu met í forsøluini av atgongumerkjum, og fólk hava tikið ótrúliga væl ímóti nýggja konseptinum, sigur Jóhannus á Rógvu Joensen við Rás2.

Endaðu við einum braki

Sum verða man vóru fleiri av bólkunum væl fagnaðir av ólavsøkugestunum, og serstakliga endin setti Tórsgøtu á gos. Við Páll Finni Páll og Frændum sum seinastu bólkunum, gjørdist hetta mest sum ein lítil forsmakkur uppá tann víðagitna midnáttarsangin á ólavsøku. Nærum hvørt mannabarn í landinum dugir at syngja við til løgini hjá hesum vælumtóktu bólkum, og tað bleiv eisini gjørt hetta kvøldið í Tórsgøtu.

### Faroe5 góvu sítt til ólavsøkuna

Tað er neyvan ov nógv sagt, tá ið sagt verður, at kvinnurnar í Faroe5 hava havt trupult við at finna sína røttu hill. Hóast mong av løgum teirra eru vælumtókt, so hava tær kortini havt trupulleikar við at funnið sítt rætta image. Men nú tykist tað mest sum, at kvinnurnar í Faroe5 hava tikið seg fram, og við harðari venjing hava tær umsíðir funnið sítt rætta stað á pallinum.

Við einari professionellari og gjøgnumførdari framførslu bjóðaðu tær millum annað ólavøkugestunum sína egnu útgávu av ólavsøkusanginum – á tann deiliga Havn.